## SVIMJING FYRI RØRSLUTARNAÐ

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8062 | Hóskvøld | 19.00 - 19.45 | Elna S. Hansen | Eysturskúlin |
| 8069 | Hóskvøld | 19.45 - 20.30 | Guðrun Jacobsen | - |

## SVIMJING í GUNDADALI

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8000 | Mikukvøld | 17.00 - 18.30 | Tóra Hansen, Ingolvur Gunnarson, Mariann Øster, Elna S. Hansen, Marta Tausen, Mats Brisenfeldt, Eyvind A. Hansen o.o. | Gundadalur |

## ÍTRÓTT - fyri menningartarnað

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8016 | Mánadag | 16.30 - 18.00 | Petur Niclasen, o.o. | Læraraskúlin |
| 8017 | Týsdag | 16.30 - 18.00 | Tina Jacobsen, Petur Niclasen og Dan Lamhauge | Læraraskúlin |

## FÓTBÓLTUR - stavbóltur fyri menningartarnað

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8054 | Mánadag | 16.30 - 18.00 | Johan Stenberg | Ovara høll í Kommunuskúlanum |

## BOCCIA

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Royndir leikarar | | | |
| 8036 | Týsdag | 16.00 - 17.30 | Ingolvur Gunnarson | Skúlin á Trøðni |
| | Óroyndir leikarar | | | |
| 8050 | Týsdag | 17.30 - 19.00 | Nina Brockie | Skúlin á Trøðni |
| | Royndir leikarar | | | |
| 8008 | Hósdag | 16.00 - 17.30 | Dan Lamhauge | Skúlin á Trøðni |

## FIMLEIKUR FYRI AUTISTAR

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8020 | Mánakvøld | 19.30 - 21.15 | Jákup Jóanesarson | Komm. niðara høll |

## BORÐTENNIS

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8018 | Hósdag | 16.30 - 18.00 | Bergur Samuelsen | Læraraskúlin |

## FRÆLS ÍTRÓTT

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8065 | Týskvøld | 16.00 - 16.55 | Sonni Djurhuus | Fimleikarahøllin í |
| 8066 | Hósdag | 16.00 - 16.55 | - | Hoyvíkar Skúla |

**TILMELDINGARSEÐIL – Skrivið við spjaldrastavum**

Navn og eftirnavn: ______

Bústaður: ______

Føðingardagur: ______

Telefon/fartelefon: ______

T-postur: ______

Flokksnr.: ______

Undirskrift: ______

Tilmeldingarseðil skal sendast til: Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
Boks 353, 110 Tórshavn

## SANGUR OG TÓNLEIKUR

| Floksnr. | Gjald | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | **KAMARKÓR royndir sangarar** | | | |
| 5510 | | Hóskvøld 19.30 - 22.00 | | Fróði Sandoy | Kommunuskúlin |
| | | **KÓRSANGUR - Glymur - rútm. kór** | | | |
| 5560 | | Mikukvøld 19.30 - 22.05 | | Pauli Hansen | Læraraskúlin |
| | | **KÓRSANGUR - Havnarkórið** | | | |
| 5515 | | Hóskvøld 19.30 - 22.30 | | Ólavur Hátún | Sankta Frans Skúli |
| | | **BLOKKFLOYTA/SAMANSPÆL byrjar 29. oktober 2003** | | | |
| 5506 | kr. 480,- | Mikudag | 16.30 -18.10 | Sharon Weiss | Listaskálin |
| | | **HARMONIKA** | | | |
| 5550 | kr. 480,- | Mánadag | 16.30 - 22.20 | Niels Olsen | Kommunuskúlin st. 5 |
| | | **GITTAR** | | | |
| 5543 | kr. 480,- | Eftir nærri avtalu | | Karl Anton Klein | Margarinfabrikkin |
| | | **EI-GITTAR** | | | |
| 5544 | kr. 480,- | Eftir nærri avtalu | | - | - |
| | | **KEYBOARD** | | | |
| 5545 | kr. 480,- | Eftir nærri avtalu | | - | - |
| | | **GITTAR** | | | |
| 5565 | kr. 480,- | Mánakvøld | 18.00 - 21.00 | Mikkjal Hvannastein | Skansastova |
| | | **GITTAR Á BYRJANARSTØÐI** | | | |
| 5573 | kr. 480,- | Eftir nærri avtalu | | Kaj Johannessen | Skansastova |
| | | **TRUMMUR/SAMANSPÆL** | | | |
| 5563 | kr. 480,- | Eftir nærri avtalu | | Rógvi á Rógvu | Skansastova |

**TILMELDINGARSEÐIL – Skrivið við spjaldrastavum**

Navn og eftirnavn: ______

Bústaður: ______

Føðingardagur: ______

Telefon/fartelefon: ______

T-postur: ______

Flokksnr.: ______

Undirskrift: ______

Tilmeldingarseðil skal sendast til: Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
Boks 353, 110 Tórshavn

## FRÍTÍÐARVIRKSEMI - BØRN OG UNG

| Floksnr. | Gjald | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | **UNG LIST** | | | |
| | | Fyri børn frá 4. flokki til 14 ár | | | |
| 6012 | Kr. 200,- | Mánadag | 15.00 - 18.00 | Lærari søkist | Gamla Reinsarí, miðhæddin |
| 6013 | Kr. 200,- | Týsdag | 15.00 - 18.00 | - | - |
| 6014 | Kr. 200,- | Mikudag | 15.00 - 18.00 | - | Gamla Reinsarí, miðhæddin |
| 6015 | Kr. 200,- | Hósdag | 15.00 - 18.00 | - | - |
| | | Fyri 14 ár og eldri | | | |
| 6016 | kr. 200,- | Týskvøld | 18.00 - 21.00 | Lærari søkist | Gamla Reinsartí, miðhæddin |
| | | **MARGARINFABRIKKIN MATGERÐ** | | | |
| 6000 | kr. 200,- | Mánadag | 15.00 - 17.00 | Finn Jespersen | Margarinfabrikkin |
| | | **GITTAR** | | | |
| 6008 | kr. 200,- | eftir nærri avtalu | | Karl Anton Klein | Margarinfabrikkin |
| | | **SJÓNLEIKARASKÚLI FYRI BØRN OG UNG** | | | |
| | | Byrjanarflokkur - dreingir og gentur 7 - 13 ár | | | |
| 6035 | kr. 200,- | Týsdag | 14.00 - 15.30 | Hedvig Westerlund | Sjónleikarahúsið |
| | | Framhaldsflokkur - dreingir og gentur 8 - 13 ár | | | |
| 6036 | kr. 200,- | Týsdag | 15.30 - 17.00 | Hedvig Westerlund | Sjónleikarahúsið |
| | | **BRIDGE SKÚLI** | | | |
| 6039 | kr. 200,- | Mánakvøld | 19.00 - 21.35 | Arnbjørn Sivertsen | Bridgehúsið |

**Skúlin byrjar mánadagin 20. oktober 2003**
**Neyðugt er at melda til sum skjótast.**

**Avgreiðslutíðirnar eru hesar:**
**Mánadag til hósdag kl. 15.30 - 19.00**

**Telefon 31 77 55**
**Kvoldskulin@torshavn.fo**

**TILMELDINGARSEÐIL – Skrivið við spjaldrastavum**

Navn og eftirnavn: ______

Bústaður: ______

Føðingardagur: ______

Telefon/fartelefon: ______

T-postur: ______

Flokksnr.: ______

Undirskrift: ______

Tilmeldingarseðil skal sendast til: Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
Boks 353, 110 Tórshavn



# Vága samferðslusøga klár í 2004




*Vágamaðurin Dánjal Poulsen í Havn, ið samskipar verkætlanina um Vága samferðslusøgu, heitir á fólk um at koma við myndum og øðrum áhugaverdum tilfari í hesum sambandi. Vágatunnilin er avgjørt størsta hending í Vága samferðslusøgu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Mánakvøldið 15. september var fundur í hølum Miðvágs fornminnisfelags, har sett varð út í kortið og ein arbeiðsbólkur settur til at savna tilfar til eina bók um samferðslusøguna í Vágum. Miðað verður ímóti at bókin verður klár til prenting í oktober 2004**

SØGA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan Vestanstevnuna í fjør hevur verið arbeitt við at eini ætlan um at geva út eina søguliga bók um samferðsluna í Vágum. Mánakvøldið 15. september var fundur í hølum Miðvágs fornminnisfelags, har ein verkætlan bleiv gjørd, og ein arbeiðsbólkur varð settur, sum skal taka sær av at savna inn tilfar til bókina. Dánjal Poulsen í Havn, ið er ættaður úr Vatnsoyrum, samstarvar við fornminnisfeløgini í Vágum um hesa verkætlan.

Hugskotið um bókina stavar frá forvitnisligari framsýning sum var á Vestanstevnu 2002, tá spenningurin um nýggja Vágatunnilin var í hæddini.

Eini 600 fólk vitjaðu framsýningina, ið umfataði ferðing millum Vágar og Streymoy heilt frá gamlari tíð og til okkara dagar.

Bókin verður givin út í samstarvi millum Miðvágs Fornminnisfelag, Sørvágs Bygdasavn og Sandavágs Fornminnisfelag, ið er undir endurstovnan. Hesi trý feløgini taka sær av tí partinum av bókini, sum umfatar ta gomlu tíðina, meðan Dánjal Poulsen kemur at skipa fyri flog- og tunnilssøguni.

Arbeiðsbólkurin heitir á fólk, sum hava góðar myndir av flutningstólum so sum skipum, bussum, rutubilum ella flogførum, um til ber at læna tær. Eisini myndir av áhugaverdum hendingum og forvitnisligar søgur hava stóran áhuga. Sørvingurin, Einar Petersen, sáli, hevur eisini savnað myndir og skrivað nakað um akfør í Vágum.

Vágatunnilin er avgjørt størsta hending í Vága samferðslusøgu; tí verður søgan skrivað nú, so fólk kunnu fáa eina fatan av teimum ovurhonds stóru broytingunum í samferðsluni í Vágum.

Tá hugsað verður um, at eisini Gásadalstunnilin er liðugur og verður tikin alment í brúk nakað skjótt, so gongur ivaleyst long tíð, áðrenn stór frambrot verða aftur á samferðsluøkinum í Vágum.

Útgevararnir hava fingið sera góðan fíggjarligan stuðul til verkætlanina, og miðað verður ímóti at fáa bókina klára til prenting í oktober 2004.

Tey sum eiga tilfar kunnu seta seg í samband við eitt av feløgunum í Vágum ella Dánjal Poulsen á telefon 212600.

# Nú rúka nummarspjøldrini

TÍÐINDASKRIV

Bileftirlitið hevur í dag latið politistøðunum kring landið 422 mál um vegskattaeftirstøður. Nummarspjøldrini verða tikin av akførum, sum enn ikki hava goldið vegskatt fyri seinna hálvár 2003.

Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum.




Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

*Framhald av síðu 12*

og ikki minst, tá nýggjar samfelagsætlanir skulu fremjast

Tað er avgerandi fyri at fáa eina miðfyrisiting at virka betri, meira effektivt og bíligari, at tað samstundis sum aðalráðini fara úr 9 niður í 6, eisini verða stovn sett kompetent, tvørfaklig toymi (arbeiðsbólkar) (team) frá ymiskum ráðum til loysn av serligum samfelagsligum ætlanum sum politiska skipanin setur út í kortið. (er ógreitt, má lýsast við einum dømi)

Samstundis er tað altavgerandi at aðalstjórarnir hava eitt neyvt og gott samstarv, bæði tá tað snýr seg um tær dagligu fyrisitingarligu uppgávurnar, og ikki minst tá nýggjar samfelagsligar ætlanir verða lagdar politiskt. Líka neyðugt er at aðalstýrini virka sum ein samanhangandi eind, við væl samskipaðum felagsfunktiónum, so sum lógardeild, vekslara og móttøku. Borgarin fær tá eina kenslu av, at hann vendir sær til miðfyrisitingina og ikki til ein tilvildarligan stovn.

Við hesum tiltøkum verður miðfyrisitingin meira effektiv, veitir borgarunum eina betri tænastu og verður sum frálíður eisini bíligari fyri skattaborgaran.